# Listafólk eiga at vera lítillátin

**– Mentan eigur avgjørt at verða stuðlað, men spurningurin er, hvør skal fáa pengar, hvussu nógv og hvør skal gera av, hvat góð list er. Eg havi ilt við at skilja, at fólk vilja á fíggjarlógina, bert tí tey arbeiða við list. List, sum eingin skilur, sigur Jógvan á Lakjuni, sum er hægsti lóggevandi persónur í landinum, tá umræður mentan**

MENTUNARÁLITIÐ
*Turið Kjølbro*



*– Eg kenni ómetaliga nógv fólk, sum alt sítt lív hava arbeitt við list, men sum einki krevja, sigur Jógvan á Lakjuni*

Mentunarálitið, Mentan og menning, hevur ikki fingið heita móttøku frá formanninum í mentunarnevnd løgtingsins, Jógvan á Lakjuni. Gott eitt døgn eftir, at tað varð almannakunngjørt og lagt fyri tingið úttalaði hann seg í útvarpinum um álitið og setti spurnartekin við, hvat mentan og list eru, og hvør eigur at fáa pengar fyri list og ikki. Dagin fyri álitið skuldi til aðalorðaskifti í tinginum segði hann í blaðnum, at hann ikki hevði lisið álitið, og hetta endurtók hann sum framsøgufólk fyri fólkaflokkin undir aðalorðaskiftinum. Dagin eftir aðalorðaskiftið seta vit honum nakrar spurningar, fyri at vita, hvat býr undir avgerðini ikki at lesa mentunarálitið. Fyrst spyrja vit hann, um tað ikki er átaluvert, at formaðurin í mentunarnevndini, sum er hægsti lóggevandi persónur í landinum, tá umræður mentan, ikki lesur álitið undan einum aðalorðaskifti, tá ið hesin sami er framsøgumaður.

– Eg hevði lisið álitið leysliga ígjøgnum kvøldið fyri. At halda eina røðu hevur ikki nógv uppá seg. Tað sum er nógv meiri átaluvert er, at álitið verður lagt til aðalorðaskifti.

*Hví er tað átaluvert?*

– Tí at tingið arbeiðir undir trýsti. Spyrt tú, hvussu nógvir tingmenn hava lisið álitið, finnur tú ikki fleiri enn fimm. Málið er als ikki viðgjørt í fólkaflokkinum.

*Er tað ikki ein spurningur um raðfesting?*

– Als ikki.

*Siga vit, at álitið var um vinnupolitikk, hevði tú so lisið tað?*

– Nei, ikki um eg ikki havi tíð.

*Onnur fólk arbeiða undir trýsti hvønn dag og hava kortini lisið álitið?*

– Eg havi ikki havt tíð at lesa tað, so einfalt er tað. Eg siti eisini í vinnunevndini, og vit hava viðgjørt 25-30 mál eftir einari viku. Tað ber ikki til at taka støðu til slíkt langt fram í tíðina, tá ið eg ikki havi sæð álitið fyrr. Hetta er so langt úti, at tað er ein vanvirðing av tinginum. Og hví eru teir ikki komnir við álitinum fyrr?

*Summi tingfólk hava lisið álitið?*

– So hava tey havt tíð. Eg havi arbeitt alt vikuskiftið, verið á fundi og sett meg inn í mál. Tað er tað, tit eiga at leggja tykkum eftir, hvussu ósakligt tað er av tjóðveldisflokkinum at leggja álitið til aðalorðaskifti. Aðalorðaskiftið átti at verið, tá ið eitt nýtt ting hevur tikið við. At leggja tað fram nú er bara valagn hjá tjóðveldisflokkinum.

*Spurningar, tú setti undir orðaskiftinum, vóru brá av, at tú ikki hevði sett teg inn í málið?*

– Tað er við vilja, at eg provokeri.

*Alla tíðina at seta spurnartekin við, hvat list er og ikki, og hvør list eigur at verða stuðlað og ikki, er tað ikki við til at seta kílar í kjakið?*

– Skilji ikki spurningin.

*Gongur tú ikki inn fyri, at listafólk, sum av fullum huga vilja arbeiða við síni list, fáa umstøður til tað?*

– Jú, tað geri eg, men tað veldst um, hvussu nógv tey skulu stuðlast. Tað eru so øgiliga nógv listafólk, sum vilja at arbeiða við listini og bara henni. Havi sjálvur verið við til at broyta Mentunargrunnin soleiðis, at listafólk fáa umstøður, men tað sum eg alla tíðina sigi, er, at vit eiga at ansa eftir, at tað ikki vera nøkur listafólk, sum einsamøll skulu gera av, hvør skal hava stuðul og hvør ikki.

*Meinar tú, at ráðini, sum skulu setast á stovn, verða óheft?*

– Ja.

*Er tað ikki trupult at seta óheft ráð, tá ið listarliga umhvørvið er rættiliga avmarkað?*

– Nei, tí listarliga umhvørvið er ikki so lítið.

*So er í grundini einki at óttast?*

– Nei, møguliga, men tað geri eg kortini. Á sinni, tá ið Mentunargrunnurin varð broyttur, løgdu vit stóran dent á, at nevndin hevur breiða samfelagsliga umboðan. Nú verður tosað um, at fólk, sum eru sakkøn, skulu sita í ráðunum. Hvørji fólk eru tað? Hevði eg verið skikkaður til tað?

*Er tað ikki Jante-lógin, sum skínur ígjøgnum tínar meiningar?*

– Eg havi ilt við at skilja, at fólk vilja á fíggjarlógina, bert tí tey arbeiða við list. List, sum eingin skilur.

*Er tín hugburður til list og listafólk, sum royna nýggjar leiðir, ikki nakað avoldaður?*

– Jú, kanska. Havi ilt við at skilja nøkur av hesum hugtøkunum, sum verða brúkt.

*Er tað bara list, sum øll skilja, sum skal stuðlast?*

– Tað sigi eg ikki. Eg kenni ómetaliga nógv fólk, sum alt sítt lív hava arbeitt við list, men sum einki krevja. Listafólk eiga at vera lítillátin. Verða tey roknað sum listafólk av teimum, sum fara at sita í hasum ráðunum? Og hví skulu øll á fíggjarlógina?

*Hvør sigur, at øll skulu á fíggjarlógina?*

– Er tað ikki tað, vit tosa um. So havi eg lisið álitið ov illa. Eg eri avgjørt fyri at stuðla góðari list, og at fólk í avmarkaða tíð fáa starvsløn, um tey hava eina verkætlan. Spurningurin er bara, hvussu nógv.

*Í hesum døgum verða pengar játtaðir til líkt og ólíkt?*

– Mentanin fær pengar av øðrum játtanum eisini. Er tað so nógv betri í Danmark, har nógvir pengar verða játtaðir til mentan?

*Her tosa vit um útinnandi list.*

– Hvat er útinnandi list? Er musiksskúlin eisini útinnandi? Musiksskúlin hevur ómetaliga stóran týdning fyri alt landið.

*Eyðun Johannesen, leikstjóri, sigur í blaðnum í gjár, at tað er ongantíð so umráðandi sum nú at fáa ein virknan mentanarpolitikk, fyri at kunna standa ímóti mentanarimperialismuni, sum ongantíð er so hóttandi sum nú.*

– Vit hava eitt blómandi mentunarlív í Føroyum. Avgjørt eiga vit at verja okkara mentan móti ágangi uttanifrá. Spurningurin er bara, hvussu vit gera tað. Tað er ógvuliga umráðandi, at øll mentanin kring landið verður lívgað, ikki bara í Havn. Tað vísir seg, at flestu pengarnir enda í Havn.






# Vil hava at vita, hvør hevur gjørt uppgávurnar

**Føroya Lærarafelag kannar um tað kann fáa innlit í, hvør hevur gjørt uppgávurnar til skrivligu royndirnar í fólkaskúlanum**

BLOKADAN
*Turið Kjølbro*



*Stendur ein skúlin og vantar tilfar til næmingarnar at gera páskaprýði burturúr, forðar blokadan hesum, um skúlin ikki eigur slíkt á goymslu*

At uppgávur eru gjørdar til próvtøkurnar í fólkaskúlanum í summar, hóast Føroya Lærarafelag hevur sett í verk blokadu ímóti allari uppgávugerð, er ikki nakað sum fer aftur við borðinum uttan víðari. Í fyrstu syftu hevur Lærarafelagið hert blokaduna enn meiri til eisini at umfata rætting av uppgávum, og í øðrum lagi kannar felagið, hvussu felagið kann finna fram til, hvør hevur gjørt uppgávurnar.

–Nevndin hevur havt fund við sakførara felagsins um tað bakbit, føroyska læraranum hevur verið fyri, við at Mentamálastýrið í loyndum hevur fingið fólk at gera próvtøkutilfar til skrivligu fráfaringarroyndirnar, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna felagsins

Í hesum sambandi verður kannað, hvørja rættarstøðu felagið hevur viðvíkjandi almennum innliti, tá ið tað snýr seg um at fáa at vita, hvør hevur gjørt uppgávurnar, og hvør hevur fingið goldið fyri uppgávugerð. Nevnd felagsins arbeiðir víðari við málinum og fer at kunna føroysku fakfeløgini og tey norðurlendsku lærarafeløgini um, hvat er hent í málinum.

Síðani 20. februar hevur blokadan hjá Føroya Lærarafelag eisini umfatað savnsrøkt. Tað vil siga, at lærarar skulu ikki at hava umsjón og røkt av amboðum um hendi, rudda høli, skáp, samskipa innkeyp av tilfari, fylgja við í, hvat vantar av tilfari og so framvegis. Stendur ein skúlin og vantar tilfar til næmingarnar at gera páskaprýði burturúr, forðar blokadan hesum, um skúlin ikki eigur slíkt á goymslu. Onki pappír, onki klistur, og ongar vattkúlur kunnu keypast, og ongin rekvisitión skal skrivast. Einasta, sum er undantikið, er dagligt innkeyp av tilfari til heimkunnleika, og vanlig upprudding eftir hvønn undirvísingartíma.

Hóast Mentamálastýrið hevur fingið til vega próvtøkuuppgávur, verður tað ikki sum at siga tað, at finna próvdómarar til at rætta uppgávurnar. Tað er ikki tænastuskylda at vera próvdómari til skrivligu fráfaringarroynd og víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tí noktar Føroya Lærarafelag limum felagsins at gera hetta arbeiðið.

Alt hetta er sett í verk, tí hvørki kommunurnar, Mentamálastýrið ella Fíggjarmálastýrið vilja gjalda fyri røkt av serhølum og amboðum.

# Hátíðarhalda við ringum tannabiti

**–Flest allir lærarar fara treyðugt undir hetta hátíðarhald, og tað er av fleiri orsøkum. Hugsa vit um álitisbrotið, sum Mentamálastýrið hevur framt ímóti føroyska læraranum, áttu vit at sýtt fyri at hátíðarhalda yvirtøkuna av føroyska fólkaskúlanum, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*



*– Flest allir lærarar fara treyðugt undir hetta hátíðarhald, sigur Elsa Birgitta P. Petersen*

Fyrsta dagin í hesum árinum varð fólkaskúlin allur á føroyskum hondum, og nú skal tað hátíðarhaldast. Mentamálastýrið áleggur 20. mars, sum er mikudagin í komandi viku, fólkaskúlunum kring landið at hátíðarhalda, at skúlin er yvirtikin. Men Føroya Lærarafelag tekur ikki ímóti hesi áheitan við lógvabrestum.

– Sæð í ljósinum av tí sviki og álitisbroti, sum Mentamálastýrið hevur framt ímóti føroyska lærar-anum, vildu vit ynskt, at vit kundu noktað limum felagsins at skipa fyri hátíðarhaldinum. Tíverri kunnu vit ikki tað, men mugu akta, tá ið landsstýrismaðurin gevur eini slík boð. Men tað verður við ringum tannabiti, og tað harmar okkum, at landsstýrismaðurin gevur slík boð við so stuttari freist, sigur nevndin í Føroya Lærarafelag.

Føroya Lærarafelag átalar Mentamálastýrið og landsstýrismannin, at skúlarnir fáa slík boð við so stuttari freist, samstundis, sum skúlarnir fáa boð um at gera ársætlanir, har alt virksemið á skúlunum skal vera lagt í fasta legu í góðari tíð. Hátíðarhaldið kemur serliga tvørt fyri hjá teimum skúlum, sum hava starvsvenjing og verkætlanararbeiði. Blokadan ávirkar eisini hátíðarhaldið, tí einki undantaksloyvi verður givið innkeypi til hátíðarhaldið, og hvat fyrireikingini viðvíkir, verður hon ikki víðkað til hetta serliga høvið.

## Fyrisitingin langt frá næmingunum

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag skilir ikki, at hátíðarhaldið skal vera nú.

– Hví fingu skúlarnir ikki boðini, tá teir byrjaðu eftir nýggjár. Fyrsta dagin eftir jólafrítíðina hevði hátíðarhaldið ikki órógvað undirvísingina so nógv. Tað hevði verið meira hóskandi tá. Og so havi eg eisini sæð uppskotið frá Mentamálastýrinum, hvat bakgrundstilfar mælt verður til skal nýtast. Tað er ikki at flenna at, men eg geri tað hóast alt, tí tað vísir, hvussu langt hesi fólk eru frá næminginum.

– Flest allir lærarar fara treyðugt undir hetta hátíðarhald, og tað er av fleiri orsøkum. Í fyrsta lagi tí tað er boðað frá við so stuttum skotbráði, í øðrum lagi tí henda tíðin longu er fastløgd í skúlunum, og í triðja lagi tí lærararnir eru rasandi um, at Mentamálastýrið í loyndum hevur fingið nakrar próvtøkuuppgávur til vega so ella so. Væntandi nakrar discount-uppgávur, sum onkur blokadubrótari hevur klipt og klistrað saman, ella nakrar gamlar uppgávur til sjúkraroyndir. Um so er, at gamlar sjúkrauppgávur verða brúktar, og tað kann væl vera, so fari eg at heita á allar lærarar, sum hava 9. og 10 flokk, at geva næmingunum hesar til heimauppgávur longu nú, tí á øllum skúlum finnast hesar gomlu próvtøkuuppgávur og uppgávur til sjúkrapróvtøkur. Vanliga verða gamlar uppgávur nýttar til dagligu undirvísingina fyri at fyrireika næmingarnar til eina komandi próvtøku, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

## Hátíðarhald

Landsstýrismaðurin við mentamálum hevur gjørt av, at yvirtøkan skal gerast tilvitandi í huga næminganna. 20 mars í ár er tí lýstur at vera evnisdagur við evninum: Hin føroyski skúlin/Okkara skúli.

Hendan dagin er ætlanin, at allir skúlar í landinum skulu arbeiða við hesum evninum. Skúlarnir gera sjálvir av, hvussu teir skipa evnisdagin, men innihaldið í degnum skal vera yvirtøkan av sjálvum skúlaverkinum.

– Vóni, at hesin dagurin fer at fáa undirtøku úti á skúlunum, og at hetta tiltakið kann styðja undir tilvitanina um okkara skúlaverk, og at tað nú eru vit einsamøll, ið hava ábyrgdina, bæði fyrisitingarliga, fíggjarliga og námsliga. Tað er okkara ábyrgd, at føroyski skúlin framvegis verður ein mentanarberi og ein kunnleikagevi saman við tí uppfostrandi leiklutinum, sum skúlin altíð hevur havt, at tilbúgva næmingin til tað komandi lívið og samfelagið, sigur Óli Holm, landsstýrismaður, í kunning til skúlarnar.